# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Minningarhaldið fyri manningini á Onnu

**Tann 13. september varð sett ein navnatalva við gravsteinin í gamla kirkjugarði í Reykjavík yvir manningini á toftasluppini Anna, sum fórst undir Íslandi í 1924. Frammundan er ein stórur steinur á grøvini, men hann var uttan nøvn**

MINNINGARHALD
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*



*Hendan myndin er frá minningarhaldinum í 1999. Hetta eru børn hjá teimum, sum fórust við Onnu, og sum vóru við. F.v. Kristian Joensen, vanliga kallaður Kidda, Johan Hendrik Poulsen, Katrina Jensen, Jacob Michael Mikkelsen. Frammanfyri situr Berlina Olsen*

Tað hevur verið ein saknur, at eingi nøvn vóru á upprunaliga gravsteininum. Jákup Michael Mikkelsen, uppkallaður eftir pápanum, sum var ein av manningini, hevur tikið stig til hetta. Eftir at formell loyvi vóru givin varð plátan sett á grøvina.

Forlissið hjá Onnu var ein av teimum mongu sorgarleikunum hjá føroyskum fiskimonnum, síðan føroyingar byrjaðu skipsfiskiskap.

Sjálvur kom eg á ein serligan hátt tætt inn at hesi hending. Í 1999 fór nevndin í fiskimannafelagnum til Íslands at vitja systirfelagið Sjómannasamband Íslands, har føroyavinurin Óskar Vigfusson hevði verið formaður í mong ár.

Eg havi sum nógv onnur altíð vita um tær tvær fiskimannagravirnar í gamla kirkjugarði í Reykjavík. Nevniliga hjá manningini á Onnu, sum fórst í 1924, og Acorn, har sjey mans brendust til deyða í 1928.

Tí var lagt inn í skránna á umrøddu ferð kransalegging á hesar gravir. Við nærri kanning vísti tað seg, at hetta ár vóru júst 75 ár liðin, síðan vanlukkuna við Onnu.

Hetta skapti ein slíkan áhuga hjá familjunum hjá teimum, sum fórust við hesum vanlukkum, at fleiri teirra komu við til Íslands.



*Vegna íslendskar fiskimenn helt formaðurin í Sjómannasamband Íslands, Sævar Gunnarsson, røðu*



*Theodor Poulsen, abbasonur skiparan á Onnu við sama navni, helt røðu fyri tey avvarðandi*

## Minningarhaldið

Tískil varð ætlaða kransaleggingin broytt til eitt minningarhald. Í fyrsta umfari fyri teir fiskimenn, sum lógu í hesum kirkjugarði, men annars fyri teir hundraðtals fiskimenn, sum høvdu mist lívið við Íslands strendur, og sum bert fingu eina váta grøv.

Tað kann tískil vera av áhuga at greiða frá hesum minningarhaldi. Tað var hildið sunnumorgunin 15. august 1999 kl 10 í fagrasta summarveðri. Um 100 fólk vóru til staðar, bæði føroyingar og íslendingar. Tað passaði so væl, at tað var ein norrøn fiskivinnustevna í Reykjavík júst tá, og har vóru føroyingar eisini við. Eini 20 ættarfólk vóru við. Av hesum vóru fimm børn hjá teimum, sum fórust við Onnu.

Tey vóru Johan Hendrik Poulsen og Katrina Jensen, børn hjá skiparanum Theodor Poulsen, Kristian Joensen, sonur Edvard Joensen, Jákup Michael Mikkelsen, pápin kallaðist tað sama, og Berlina Olsen, dóttir Johannes Poulsen.

Gjørt var eitt hefti við tilfari um vanlukkuna. Her vóru eisini sangir, sum vóru sungnir til jarðarferðina, teir vóru aftur sungnir til hetta høvi.

Røðarar vóru táverandi formaður í Føroyar Fiskimannafelag, formaðurin í Sjómannasambandi Íslands, Sævar Gunnarsson, Theodor Poulsen fyri tey avvarðandi á Onnu, Jógvan Mørkøre í Hósvík fyri tey avvarðandi á Acorn og Petur Nolsøe frá føroyska sjómansheiminum í Reykjavík.

Theodor er abbasonur skiparan á Onnu við sama navni. Hann nevndi hvussu hart Toftabygd varð rakt av hesi vanlukku. Bert á Toftum vóru fimm einkjur við 20 børnum. Onkur einkja sat eftir við sjey børnum. Hann nevndi, at líðingarnar hjá hesumm kvinnum, sum sótu eftir kundu vit bert hugsa okkum til. Tíðirnar vóru ringar og versnandi, til fiskaprísirnir fóru í botn í 1929. At koma undan var ein kampur hvønn dag. Tryggingar vóru lítlar og ongar. Men hesar konur bardu seg undan og børnini komu sum heild væl fyri.

Jógvan Mørkøre greiddi eisini frá, hvussu tey upplivdu vanlukkuna við Acorn. Greitt varð frá hesum í samrøðunum vit høvdu við Dinnufíu Ferjá frá Gjógv seinasta ár.

Aftaná røðurnar vóru kransar lagdir á gravirnar. Síðan bjóðaði sjómansheimið Ørkin til ein drekkamunn, har tað vóru eini 80 fólk.

## Á vanlukkustaðið

Seinnapartin varð skipað fyri útferð til Staðarberg nærindis Grindavík, har vanlukkan hendi. Her vóru eini 40 fólk við. Ein gamal starvsmaður hjá bjargingarfelagnum í Grindavík, Óli nevndur, kundi nágreiniliga vísa á, hvar skipið fórst, og hvar líkini komu á land. Við Staðarberg varð eisini sungin ein sangur og Jákup Mikael las Faðirvár. Hetta var eisini ein kensluborin løta.

Aftaná var farið til Grindavíkar, har sjómannafelagið og bjargingarfelagið bjóðaðu til ein drekkamunn.

Um kvøldið bjóðaði FF til døgurða á sjómansheiminum, har eini 50 fólk vóru til staðar. Her vóru eisini røður hildnar.

Hetta var eitt minniligt minningarhald, sum tey avvarðandi vóru sera fegin um. Tey eftirsitandi høvdu følt tað sum ein sakn ikki at hava kunnað tikið rættuligt avskeð við síni kæru, sum vóru farin. Hesi fingu nú frið í sálina, um tað kann sigast so. Nú føldu tey seg at hava sagt endaliga farvæl.

Tey, sum skipaðu fyri hesum tiltaki, vóru eisini fegin um tað. Her fekk ein rættuliga kenslu av, hvat fiskimenn og teirra avvarðandi hava ofrað fyri sítt land.

## Á Svangaskarði

FF hevði fíggjað fólk frá sjónvarpinum at koma við á ferðini. Tískil varð alt hátíðarhaldið tikið upp. Tórur Mikkelsen, sum er abbasonur ein av manningini, gjørdi eina sending frá haldinum, sum varð víst í sjónvarpinum.

Tað var eisini avrátt at hava eina serliga samkomu á Toftum, har upptøkan úr Íslandi skuldi vísast, og kundi hetta vera eitt framhald av minningarhaldinum í Íslandi.

Henda samkoman varð hildin 11. september 1999 á Svangaskarði. Tað visti seg, at tað var eisini stórur áhugi fyri hesum tiltaki. Hølið varð fult og tey vóru eini 250, sum komu.

Aftaná, at filmurin var vístur, var orðið frítt. Tað vóru fleiri sum høvdu orðið og mintust báðar vanlukkur. Ein tann mest kensluborna var hjá Fridu frá Gjógv, sum var dóttir Jákup Paula Biskupstø, sum brendist sera illa í síni úrslitaleysu roynd at bjarga soninum úr brennandi lugarinum á Acorn.

Hesa løtuna endaði Johan Olsen, sum var ein sannur vinur hjá fiskimonnum alt sítt lív.

## Elsa minnist vanlukkuna

Tey eru ikki nógv, sum minnast hesa hending, nú 84 ár eru liðin. Men ein er kortini, og tað er tann 99 ára gamla Elsa Olsen á Argjum, sum er ættað av Toftum.

Hon var 14 ára gomul tá og minnist hetta væl.

Hans, beiggi hennara, hevði verið við árið frammanundan og skuldi við aftur. Men hann var so ringur av iskias, at hann kundi ikki fara, og tað bjargaði honum lívið, og hann kom at liva sítt fulla lív.

Beiggin Matthias kom at gerast ein partur av hesum sorgarleiki. Tey flestu líkini komu á land og vórðu førd til Reykjavíkar. Her lógu nógv føroysk skip inni, og Matthias var við einum av teimum. Hann var tískil við til at eyðmerkja líkini. Tað hevur verið hart hjá honum at síggja menn, sum hann fyri kortum hevði sæð sum raskar og livandi menn, nú liggja lík. Allar manningarnar á føroysku skipunum, sum lógu inni, vóru við til jarðarferðina. Ein av teimum, sum annars skipaði fyri, var Alfred Petersen, sum var sjómanstrúboðari í Íslandi í mong ár.

## Harðar lagnur

Her vóru nógvir sorgarleikir og lagnur, sum Elsa minnist.

Skiparin Theodor Poulsen av Toftum átti fýra børn. Kona hansara hevði tveir beiggjar við. Annar, Olevinus, doyði frá sjey synum, sum vóru frá eitt til 13 ára gamlir. Hetta var sjálvsagt eina sera trupul støða hjá mammuni. Fólk vildu fegin